# Fundamentali boðskapurin í svørtum klædningi

**Árligu samfelagsmøtini hjá brøðrasamkomunum eru júst farin fram við, og eftir sita minnir um flottan kórsang, fløvandi felagssang, góðar og minni góðar talur og túsundtals vælklæddar føroyingar samlaðir undir einum taki**



UMMÆLI
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tað munnu vera fá við tilknýti til brøðrasamkomurnar, sum ongantíð hava verið á samfelagsmøti. Hjá mær sjálvari knýta møtini seg til minnir um árligar havnatúrar í køldum novemberveðri saman við festligum vinkonum. Nógv vóru møtini, sum vit skuldu á, men líka nógv tíð varð brúkt til at gera okkum lekrar á kamari á Hotel Hafnia.

Eitt sindur er broytt, síðani vinkurnar fóru havnatúr. Genturnar eru eldar, og møtini yngd. Kórsangurin er meira varieraður, ljóðførini fleiri og ljóðið er betri, og flestu talarar tykast betri fyrireikaðir og og minni hartrópandi.

Men nógv er tað sama. Tíbetur eru tað framvegis teir góðu gomlu sangirnir um tørvin á frelsu og um vónina í tómu grøvini. Sangir, sum tað tekur eina løtu at syngja, og har øll syngja hart og væl uttan dans og róp.

Boðskapurin um, at øll menniskju eru syndarar og tørva frelsu og fyrigeving er eisini tann sami, og kjarnan í samfelagsmøtunum er framvegis samfelagið. At vera saman við øðrum trúgvandi og at kenna Gud í samveru við onnur.

**Amen, geisp og buh**

Brøðramøtir eru rættiliga friðarlig í mun til nógv onnur sløg av evangeliskum møtum. Fólk lurta í frið og náðum, og tey ósøgdu amen'ini eru nokk væl blandaði við bæði buh og geisp inni í nógvum høvdum.

Ein tryggur leverandørur í fundamentala gleðisboðskapinum við livandi myndum og greiðum orðum er trúboðarin, Símun í Túni. Eg minnist eina talu, hann helt fyri fleiri árum síðani um munin millum eitt pyntað jólatræ og eitt rótfest fruktaríkt træ. Í ár var boðskapurin um náðina, og myndin um Luther og bønartrappurnar í Rom fer sikkurt at fylgja mær líka leingi sum pyntaða jólatræið.



*Tá Dupultkvartettin sang sangin, Flytifuglar, var ringt ikki at klappað. Men fólk hildu sær, og friðurin valdaði á samfelagsstevnu í høllini á Hálsi um vikuskifti*

Tað eru sjálvandi eisini minni væleydnaðar talur, onkuntíð eru orðini og setningarnir so væl kend, at tey ikki longur hava meining. So siti eg og geispi og vóni, at tað er nýtt fyri onkran. Men tá hartrópandi talarar blanda tómar flosklar við høpisleysar ávísingar til kríggj, fasistiskar extremistar í Miðeystri og 266b, so fer mítt barometur frá geisp niður á buh.

**Tigandi kvinnunar**

Brøðrasamkomurnar hava onga felags leiðslu og ongan felags politik uttan gleðiboðskapin sjálvan. Her eru eingi krøv um teologiskar útbúgvingar – um tær so eru tiknar innan fyri ella uttan fyri danska kongaríkið. Hetta gevur eina deiliga breidd og hugnaliga fólksligheit.

Men bara til eitt vist. Tí samfelagsmøtini eru brøðramøtir við denti á, at brøður eru eitt kallkynsorð. Eg hoyrdi onkra kvinnurødd syngja solo, men annars vóru kvinnur sjónliga fráverandi á øllum postum.

Tað er langur vegur til eitt kjak, um kvinnur ikki hava fingið somu náðigávur at tala sum menn, tá bara menn bjóða fólki vælkomnum úti við dyrnar, bara menn eru fyriskiparar og bara menn innleiða og enda.

Men eg havi tað við samkomuni sum onnur hava tað við løgtinginum. Tú kanst halda at tað verður sagt ov nógv býtt, og tú kanst halda, at tað eru ov fáar kvinnur. Men tað merkir ikki, at eg eri ímóti hvørki demokratiskum parlamentum ella ikki-hierarkiskum samkomum.

# Studentaskúlin í Hoydølum

HERI MOHR



Í seinastu viku lósu vit eitt lesarabræv frá trimum næmingum í Hoydølum – Rakul Jacobsen, Julian Sverri Andreasen og Rebekka á Neystabø Jacobsen. Teir, næmingarnir, høvdu fingið sum uppgávu at "kanna umhvørvi og útgerð studentaskúlans í Hoydølum." Hetta gav Dimmalætting orsøk til á fimm heilum síðum at skriva um og avmynda *Ringasta slumm í Hoydølum*. Ræðandi at lesa! Tað sigur okkum so mikið, at lítið er broytt í náttúruvakra dalinum, har tuberklasjúk í meira enn hálva øld fingu heilsurøkt, áðrenn hægri mental útbúgving flutti í "gamla hús" og "nýggja hús" (og "líkhús") hjá Sanatoriinum í Hoydølum. Óhugnin á hesum vakra staði tykist av vera permanentur – takkað verið vánaliga almenna, politiska umsiting í fortíð og nútíð.

Í 1953 skrivaði pápi mín alment um viðurskiftini á sanatoriinum. Eg loyvi mær at endurprenta brot úr greinini. Orðini *sjúklingur, lækni, sjúkrastova og sanatoriið* í greinini kunnu í lesandi løtu broytast til næmingur, lærari, skúlastovur og skúlin.

(….) "Hvat kann vera meira troystarleyst enn at koma niðan á sanatoriið, enntá bara sum vitjandi. (….) Vit her heima hava eisini dugnalæknar, men tað er ikki nokk, hini viðurskiftini skulu eisini vera hareftir til frama fyri sjúklingarnar. Kemur ein inn í sjúkrastovurnar og inn á stovuna, har sjúklingarnir kunnu hava tilhald, tá ið teir ganga uppi, fær ein kenslu av óhugna, og ein kann ikki annað enn hugsa um, hvussu lítið er gjørt fyri, at teirra tankar kunnu avleiðast, og at tey, sum har eru kunnu gleðast. Í sjúkrastovuni: Nakrir naknir veggir, ongar gardinur fyri vindeygunum, hyggja út í ta myrku nátt, meðan regnið dynjar inn á rútarnar, eitt hondvask, sum man valla finnur á teimum vesaligastu pissoirunum aðrastaðni, og eitt lítið køksspegl millum vindeyguni. – Inni í uppihaldsstovuni er, umframt eitt borð, einki annað enn stólar við træsetri og træbeinkir, ikki ein góður sessur, har ein kundi hvílt seg og hugnað sær. Ein kvinnuligur sjúklingur, ið vil gera eitthvørt handarbeiði, má antin seta seg á ein harðan træsess uttan hvíld – ella fara aftur til songar.

Tað er ikki nokk, at har eru dugnaligir læknar og sjúkrasystrar, tað skal eisini vera kvalifiserað fólk í hinum størvunum har uppi, og hugsi eg serliga um køkin. Føroyingar eru ikki vandir í mati, men eina treyt hevur ein rætt til at seta og krevja, og tað er, at maturin verður gjørdur til á besta máta, og at hann er gagnligur og vekur matarlystin. Hertil krevst fult útbúgvin og kvalifiseraði fólk. Uttan at koma nærri inn á matin, tey liva av har uppi, kann ein siga, at frísk fólk mangan høvdu lagt frá sær, og hvussu so við sjúklingunum, sum nettupp skulu hava góðan mat?

Kemur ein niðan á sanatoriið, kann ein síggja eitt av okkara størstu skaldum, Mikkjal á Ryggi, sum hevur hevjað okkara mál og givið okkum stór mentunarlig virði, ganga aftur og fram í gongini og inn í tær naknu stovurnar, stórt aðra samsýning far hann saman við felags sjúklingunum ikki frá tí almenna. Óivað vilja flest øll halda slíkt vera ósømiligt fyri Føroya fólki í síni heild.

Sanatoriið verður rikið av tí almenna. Hjá tí almenna tykist peningur ikki at tróta til mang og hvat óneyðugt, meðan tann mest tignarliga uppgávan hjá fólkavaldum monnum við grann av morali skuldi verið at farið væl um almennan pening – hann er jú ikki teirra egni – her er ein uppgáva, hvar peningur vildi verið væl og vakurt nýttur."

Tá kom eldur í. Nevndir og persónar vaknaðu. Um somu tíð fekk sjúkrahúsverkið nýggjan sjúkrahúsinspektør, Eivind Bonnevie. Sanatoriið fekk eina nýggja uppihaldsstovu til sjúklingar og vitjandi við nýggjum innbúgvi, gardinum v.m. – Alt tað gamla varð brent ella tveitt burtur.

Kanska skrivingin hjá omanfyri nevndu trimum næmingum fer at "seta eld í" eins og skrivingin hjá pápa mínum gjørdi fyri 54 árum síðani.

Gævi, at 100 ára gomul minni um sjúku, vanrøkt og politiska avmakt verða skrikt upp við rót og burturbeind. Virðing og sansur fyri náttúruvakurleika og livandi umhvørvi inni og úti skapa hugna og trivna, sum er so neyðugt – eisini hjá lesandi fólki!

# Latið ikki valið koma á tykkum

Val



BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN
Tj´ðveldi

Gjørdist ovurfegin, tá Landsstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm leygardagin í útvarpinum svaraði lesarabrævi mínum í Vikuskiftissosialinum. Hetta við at siga, at hann heldur ætlaði at longja barnsburðarfarloyvið, sum eg hevði mælt til, enn at lækka inngjaldið til skipanina, sum hann annars hevði fráboðað hóskvøldið.

Píkarill um ikki Landsstýrismaðurin í Almannamálum svarar aftur í Útvarpinum í dag sunnudag, at leingjanin skuldi deilast millum foreldrini, tí tað skal vera javnstøða, og haraftrat átalaði hann, at Bjarni Djurholm ikki hevði lagt málið fyri landsstýrið.

Nú í kvøld sigur Nicolina Højgaard, heilsusystir í ÚF, at børn verða sjúk av at fara heimanífrá 6 mánaðir gomul og at 1 ár er tað einasta rætta.

Alt ljóðar bæði væl og rætt, men tað sum nú leikar á er, at tær milliónirnar, ið eru í yvirskot í Barsilsskipanini, enda í landskassanum, tá árið er farið, um onki verður gjørt. Hugsið tykkum um løgmaður útskrivar val í morgin! So verður eingin broyting í ár. Løgtingið hevur úr at gera í hesum døgum. Lat okkum smíða meðan jarnið er heitt og leingja barnsburðarfarloyvið við 4 vikum sum skjótast. Men lat okkum endiliga eisini fara undir eitt hugmyndafrøðiligt kjak og útvega tann pening, sum er neyðugir, til tess at fylgja tilmælunum hjá almannaráðharranum og heilsusystirini.

Tá til ber hjá pinkubarninum at fáa nakrar vikur afturat við hús beinanegin, skulu vit sjálvsagt virka fyri tí. Ja, hvør dagur ger mun, og er tað nakað ½ árs gamalt barn hevur skil fyri, - so er tað, hjá hvørjum gott er at vera.